# Kyndil hongur framvegis í

*Í einum heldur rótutum dysti tryggjaði Kyndil tey bæði væntaðu stigini móti hoyvíkingum, og enn eru teir ikki heilt gloymdir í stríðnum um heiðurskrónurnar*

Jákup Mørk

Kyndil H71 32-25 (14-13)

Kyndilsliðið, sum fyrr í vikuni tryggjaði sær finalusessin í steypakappingini, var nakað skert, tá teir sunnudagin skuldu royna seg móti hoyvíkingum.

Av ymsum ávum sótu Bjarni Wardum, Hannis Wardum og Regin Petersen uttanfyri, tá dysturin byrjaði, so møguleikarnir hjá hoyvíkingum at gera okkurt óvæntað, vóru til staðar, hóast teir kanska ikki vóru so øgiliga stórir.

Hoyvíkingar høvdu eisini sítt at hugsa um, tí Allan Mørkøre var staddur í Spania við fótbóltslandsliðnum. Maður kemur tó í mans stað, og fyri hoyvíkingar man tað í hvussu so er kennast fløvandi, at Hallur Danielsen nú aftur er at síggja á besta liðnum.

### Settu ferð á seinna umfarið

Fyrsta hálva tíman leikaði rættuliga javnt á, og liðini skiftust um at hava leiðsluna.

Hoyvíkingar stríddust sera væl, og hóast spælið ikki altíð var so øgiliga væl polerað, so fingu teir kortini heilt væl burtur úr.

Kyndilsliðið kom ongantíð rættuliga upp í snúningar fyrra partin av dystinum. Ístaðin fyri at royna at koyra sítt egna spæl, fóru teir heldur inn at róta í mótstøðuverjuni, og hetta hevði eisini við sær, at spælið gekk óneyðuga seint.

Serliga var tað Niels Viggo Niclasen, sum gjørdi um seg á kyndilsliðnum. Hann hevur ikki verið so nógv við í ár, sum flestu áskoðararnir høvdu væntað, men verður mett eftir avrikinum sunnudagin, eigur hann helst at teljast millum teirra, sum verða við, tá steypafinalan skal avgreiðast komandi leygardag.

Í seinna hálvleiki kom meira ferð á kyndilsliðið, og hóast hoyvíkingarnir royndu at hanga í, so megnaðu teir ongantíð veruliga at hótta grøna herin, eftir at hesir tíðliga í hálvleikinum vunnu sær eina trygga leiðslu.

Uttan stórvegis hóvasták syrgdu leikararnir fyri, at sigurin varð fingin til høldar.

### Kunnu koma í oddin

Hvat stigini skulu nýtast til í landskappingini er ilt at meta um. Flestu áskoðararnir munnu helst vera av teirri fatan, at kyndilsleikararnir helst hava tveitt ov nógv stig burtur í dystinum um FM-heitið, og helst er hetta eisini rætt.

Tað tykist nevnliga ikki serliga sannlíkt, at Kyndil skal taka øll trý oddaliðini aftur. Hinvegin kann væl verða, at teir fanga okkurt av hesum trimum aftur, tí gongdin higartil hevur verið, at øll kunnu taka stig frá øllum. Vinnur Kyndil dystin móti kollfirðingum komandi mikudag er munurin upp til toppin bert 6 stig, so enn er einki avgjørt í so máta.



*Nei! tykist Uni at rópa á myndini, tá Bárður Brimvík enn eina ferð leypir inn og skorar. Tá saman um kom, vóru kyndilsmenn tó við yvirlutan, og enn eru teir ikki heilt afturúrsigldir í FM-stríðnum*

### Dómararnir møttu ikki

Mest merksiverda hendingin í dystinum var helst, at eingin dómari var komin, tá dysturin skuldi byrja.

Eftir tí, sum vit hava frætt, áttu strandingar at døma dystin, men allar helst er onkur misskiljing íkomin, soleiðis at boðini ongantíð eru komin til dómararnar.

Eitt er tó vist, og tað er at tað so avgjørt ikki tænir nøkrum endamáli, at slíkar hendingar taka seg upp, og vónandi er hetta seinasta ferðin, at slíkt kemur fyri.

Dysturin varð tó leiktur undir leiðslu av Gunnar Gregoriussen og Petur Dahl, og sum vit skilja á lagnum, so mundi døming teirra vera á góðari leið, hóast stutta skotbráðið teir høvdu at fyrireika seg í.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Niels Viggo Niclasen 8, Hans Áki Dahl Christiansen 6, Jacob Jónsson 6 (2), Uni Wardum 5, Janus Einar Sørensen 3, Rúni Poulsen 2, Leivur Holm 1, Bárður Mikkelsen 1
H71: Hallur Danielsen 7 (2), Bárður Brimvík 5, Halgir Dahl Olesen 4, Rene Dahl Olesen 3 (2), Eyðun Højgaard 3, Olaf Vestergaard 2, Einar Brimnes 1
**Brotskøst:**
Kyndil 3, H71 4
**Útvísingar:**
Kyndil 1, H71 5
**Dómarar úr Kyndil/H71:**
Gunnar Gregoriussen og Petur Dahl

# Avlýst

Illveðrið leygardagin førdi við sær, at fleiri ítróttardystir kring landið vóru avlýstir.

Ein av hesum dystum var dysturin, sum skuldi leikast í høllini í Vestmanna, har bestu mansliðini hjá KÍF og Neistanum skuldu hittast.

Enn er ikki avgjørt, nærhesin dysturin skal leikast, men allar helst verður neyðugt at seta onkran mikudag av, soleiðis at dysturin kann fáast frá hondini.



# Føroya Tele Cup

*Komandi vikuskiftið skipar B68 fyri innandura kapping*

Landsliðið er í Spania í hesi vikuni. Hinir føroysku fótbóltsspælararnir eru nú um mánaðarskiftið farnir undir tungu venjingina í feløgunum. Tað verður ikki altíð hildið at vera so hugaligt stríð at fáa týdningarmiklu grundvenjingina upp á pláss, og um veðrið ikki er til vildar, og tað er nógvur vindur og kavi, so verður uppgávan ikki hugaligari.

Tá er tað kærkomið at sleppa undir tak og at hava bóltin við sær. Komandi vikuskifti skipar B68 fyri innandura kapping, har tað stendur øllum á mannfólkasíðuni, sum eru sekstan ár og eldri í boði at taka lut.

Kappingin verður í ítróttarhøllini í Runavík komandi leygardag og sunnudag. Spælt verður við stórum málum. Á hvørjum liðnum verða fimm spælarar – fýra útispælarar og ein málverji – og tað er loyvt hvørjum liðnum at hava ein skiftisspælara.

Í B68 siga teir, at seinasta freist at boða frá luttøku í kappingini er hósdagin 3. februar. Kostnaðurin fyri hvørt liðið er trý hundrað krónur, og tað skal boðast frá luttøku ímillum klokkan átta og níggju á kvøldi á telefon 44 82 74 ella 44 80 68. Øll liðini skulu hava rættulig fótbóltsnøvn.

Føroya Tele er høvuðsstuðul hjá B68, og teir lata heiðursmerkir til allar spælararnar á liðunum, sum enda á trimum teimum ovastu plássunum.

# Pól til VB

*Nú er avgjørt, at Pól Thorsteinsson komandi ár aftur verður at síggja í barndómsfelagnum*

Jákup Mørk

Pól Thorsteinsson, sum seinastu tvey árini hevur leikt við B36, skrivaði sunnudagin undir sáttmála við VB, soleiðis at hann hetta kappingarárið aftur verður at síggja í barndómsfelagnum.

Ivaleyst er hetta ein kærkomin styrkur fyri vágbingar, sum í fjør høvdu eitt heldur linligt kappingarár, sum í stóran mun varð oyðilagt av vánaligu byrjanini, sum liðið fekk.

### Kanska á miðjuna

Á landsliðnum og hjá B36 hevur Pól fyri tað mesta røkt eitt av plássunum afturi í miðverjuni, men hjá VB var tað mest sum framrættaður miðvallari, at hann gjørdi um seg.

Møguliga verður tað á hesum plássinum, at Pól nú aftur skal royna seg, men hetta verður so ein spurningur, sum venjarin tekur sær av.

VB man nú hava fingið endaliga puslispælið at ganga upp, og ivaleyst ætla teir sær komandi ár at miða móti einari endastøðu í ovaru helvt av stigatalvuni, sum møguliga kann bera europeiska luttøku við sær.



# Kollfirðingar hjálpa havnarmonnum

***Talv:*** *Nú bert trý umfør eru eftir í liðkappingina verður tað sera torført hjá klaksvíkingum at taka Havnina aftur. Heili trý stig eru á muni. Í botninum berjast nú fýra lið undan niðurflyting.*



Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Toppliðið úr Havn fekk hetta vikuskifti vitjan av hvalvíkingum. Úrslitið varð 3-1 til Havnarmenn, og viðførdi at hvalvíkingar nú eru komnir í tann heldur tungara endan.

Á fyrsta borði átti Martin Brekká úr Hvalvík at vunnið móti Carl Eli N. Samuelsen, men talvið sum vardi fimm tímar endaði javnt. Martin við tí hvíta fólkinum kundi einar tvær-tríggjar ferðir gjørt enda á Carl Eli, men hesin snúði sær undan hvørja ferð.

Haldur S. Johansen úr Havn leyp sum eitt skot í krovið á Finnbirni Zachariassen, men Finnbjørn fekk sissa Haldur- og talvið niður á eitt støði har bert talan kundi verða um javnleik. Haldur trýsti alt talvið, men Finnbjørn vardi seg hegnisliga.

Á triðja borði fekk Sámal Christiansen úr Hvalvík ikki steðga sigursrøðini hjá Herlufi Hansen. Herluf vann eitt spennandi talv, sum í roynd og veru kundi fara báðar vegir. Men Sámal kom í svára tíðarneyð og tað gjørdi Herluf sær dælt av.

Á fjórða borði vann Martin Poulsen úr Havn eftir bert níggju leikir móti Bergi Magnussen. Bergur telvaði sera ósikkurt og varð í níggjunda leiki mátaður. Bergur hevði ivaleyst tapt talvið hóast alt, tí hann hevði bert seks minuttir eftir til at leika 32 leikir! Talvið er við í blaðnum.

### Torbjørn við aftur

Kollfirðingar fingu heiðurligt úrslit heim við aftur úr Klaksvíkini; úrslitið varð 2,5-1,5 til klaksvíkingar. Torbjørn Thomsen varð fyri fyrsti ferð hetta kappingarárið at síggja á kollfarðaliðnum, og tað skuldi vísa seg at vera sannur styrkur.

**Torbjørn og Rani Nolsøe leiktu javnleik á fyrsta borði. Talvið varð sera rótut, og í miðspælinum gjørdi Rani eitt mistak og misti tvær finnir, men Torbjørn hevði hinvegin ikki góða finnustøðu, og harumframt høvdu teir ólíkalittir bispar. Teir samdust tí um javnleik.**

**Hans Kristian Simonsen úr Kollafirði vann sera óvæntað við svarta fólkinum móti Ólavi Simonsen. Ólavur offraði kvalitet í byrjani, fekk opnað kongastøðuna hjá Hans Kristiani, men fekk so heldur ikki meir. Hans Kristian fekk avviklað støðuna til eitt vunnið endatalv. Hans Kristian hevur fingið heilt nógv stig í ár, og at vinna móti Ólavi er helst tað besta úrslitið hjá honum nakrantíð.**

Á triðja borði kom Steintór aftur á sigursgongd við at vinna móti Karl Louis Johannesen. Steintór fekk finnu meir og vann trygt. Tummas M. Anthoniussen úr Klaksvík fekk somuleiðis finnu meir móti Ronny í Lon og vann trygt.

Úrslitið kom ikki væl við hjá klaksvíkingum, tí neyðugt er nú hjá teimum at vinna allar dystirnar stórt og ein tepur sigur móti kollfirðingum hjálpir ikki stórvegis.

### Sandavágsmenn úr botninum

Vegna sjúku kundi Torkil Nielsen ikki vera við í botndystinum móti toftamonnum, men hinir úr Sandavági kláraði uppgávuna til fulnar. Úrslitið varð 2,5-1,5 til sandavágsmenn.

Tá Torkil ikki varð við, so mátti Bernhard Augustinussen ta tungu og avbjóðandi leið upp til fyrsta borð, men hann gjørdi ikki mætari enn at vinna móti fleirfaldaða føroyameistaranum Jens Kristiani Hansen. Báðir komu í tíðarneyð og Jens Kristian sum hevði vunna støðu, gjødi avgerandi feil og mátti lúta.

Á øðrum borði leikti veteranarnir Gutti Petersen úr Sandavági og Helgi Joensen javnleik. Eingin ivi varð um úrslitið tí støðan var sera innilæst.

Heri Christoffersen úr Sandavági og Wenzel Højgaard leiktu eitt spennandi talv, har Wenzel hevði bestu kort. Teir samdust um javnleik tá Heri hevði ein rók eftir og Wenzel tríggjar finnir.

Á fjórða borði átti Dánjal Haraldsen helst at vunnið, men Jústines Hansen úr Toftum sveik ei heldur hesa ferð. Jústines hevur altíð verið drúgvur og fekk tí hálað hálvt stig heim.

Við úrslitinum komu teir úr Sandavági hálvt stig framum toftamenn og kollfirðingar.

**Støðan í 1. deild**

| | |
|---|---|
| Havnin | 22 |
| Klaksvík | 19 |
| Hvalvík | 12,5 |
| Sandavág | 10,5 |
| Toftir | 10 |
| Kollafj. | 10 |

Sum tað sæst á stigatalvini so kunnu hvalvíkingar ikki kenna seg heilt tryggir enn. Men kenna vit teir rætt, so fara teir nokk ongan veg niður í aðru deild, tað eru teir ov sterkir til. Hvør tað verður sum fer tungu leið niður í aðru deild er ógjørligt at gita sær til.

### 2. deild og 3. deild

Í aðru deild varð bert tann eini dysturin hetta vikuskifti. Runavíkingar tóku móti Havnini 3, og úrslitið varð 3-1 til heimaliðið, og við hesum úrslitið eru runavíkingar ikki langt frá toppliðnum úr Vestmanna.

Vestmenningar høvdu fríumfar hetta vikuskifti og dysturin millum Klaksvík og Havnina 2 varð útsettur vegna veður.

Í triðju deild vann Havnin 4 dystin móti Róki 3-1, og eru framvegis tryggir á odda í deildini.

Unglingarnir telvaðu ikki í vikuskiftinum.

### Flóvin á ferð

Flóvin Tór Næs endaði við 5,5 stigum av 10 møguligum í stórari kapping í Spania. Síðsta umfar varð telvað sunnudagin og tá fekk hann ein góðan javnleik móti IM Salmennsu úr Finnlandi. Umfarið áðrenn tað vann hann móti sterkum dana, ið nevnist Kim Pilggard, so Flóvin fekk tí sera góð úrslit móti endanum í kappingini. Hann endaði sum nummar 30-54 av 107 luttakarum og tað varð væl omanfyri seedingina hjá honum. Sjálvur sigur Flóvin at hann er nøgdur við avrikið hjá sær.

Flóvin er boðin við til eina vikuskiftiskvikkapping longur suðuri í Spania, og eftir hana fer hann Danmarkar har hann er boðin við til eina lukkaða IM-kapping við tíggju luttakarum. Kappingin er í døgunum 12. februar til 20. februar í Dianelund. Á DSU heimasíðuni verður møguligt at fylgja við hvussu leikur fer.

### Kappingar uttanlanda

Sera sterka kappingin Wijk aan Zee endaði sunnudagin, og ikki óvæntað vann Garry Kasparov við 9,5 stigum av 13 møguligum. Á deildum øðrum plássi komu kempurnar Anand, Kramnik og Leko við átta stigum. Kasparov tapti einki talv, og sjálvt um javnleikur varð nóg mikið í síðsta umfarinum móti Judit Polgar fyri at vinna kappingina, so vildi hann vinna og tað hann gjørdi. Predrag Nikolic sum var og vandi føroysku telvararnar fyri nøkrum árum síðani, endaði sum nummar níggju við seks stigum.

Heini Olsen og John A. Nilssen luttaka í løtuni í Keypmannahavnarmeistaraskapinum. Teir hava báðir fýra stig eftir seks umførum og liggja á deildum øðrum plássi. Teir eru í lukkaða bólkinum við tíggju luttakarum. Teir hava telvað væl, og talvið sum John Arni vann í fyrsta umfari er við í blaðnum í dag.

Ikki óvæntað telvaðu teir báðir javnleik móti hvørjum øðrum, teir hava nevnliga altíð leikt javnleik móti hvørjum øðrum.

Í opna bólkinum luttaka Eyðun Nolsøe og Heini Danielsen. Eftir seks umførum liggja Heini D. og Eyðun væl fyri og hava ávíkavist 5 og 4,5 stig.



*Gary Kasparov vann sunnudagin sterku kappingina Wijk aan Zee. Á myndini sæst hann telva móti sterkasta kvinnuliga telvaranum í heiminum, Judit Polgar*

# Talvini hesa vikuna

*Talan er hesu ferð um tvey talv, sum vórðu leikt í ávíkavist Føroyum og Danmark*

**Hvítur: Martin Poulsen (1905)**
**Svartur: Bergur Magnussen (1815)**
**Liðkappingin 1999/2000**

1. e4 e5
2. Rif3 f5?! **(Lettisk byrjan)**
3. Bc4 fxe4
4. Rixe5 Fg5
5. Rixf7 Fxg2 **(Hvítur stendur klárt betri)**
6. Rf1 d6
7. Fh5 g6
8. Fh4 Bh3??
9. Fd8++ **Skákmát!** 1-0

**Hvítur: Jørgen Hvenekilde (2240)**
**Svartur: John Arni Nilssen (2315)**
**KM 2000**

1. e4 c5
2. Rif3 Ric6
3. b4 cxb4
4. d4 d5
5. exd5 Fxd5
6. c4 bxc3
7. Rixc3 Fa5
8. d5 e6
9. dxc6 Bb4
10. Bd2 Bxc3
11. Be2 Bxd2+
12. Rixd2 Rie7
13. 0-0 0-0
14. cxb7 Bxb7
15. Bf3 Rad8
16. Fb1 Rxd2
17. Fxb7 Rig6
18. a4 Rie5
19. Rfc1 Rfd8
20. Rc8 Rixf3
21. gxf3 Rxc8
22. Fxc8+ Rd8
23. Rc1 g6
24. Fc7?? Rd1+ **(25. Kg2 Fg5+ og hvítur missur rókin)** 0-1